## Ryanair ikki til Íslands

Herfyri visti limablaðið hjá íslendsku flogskiparunum at siga, at írska lágprísflogfelagið Ryanair umhugsaði at fara undir rutuflúgving til og úr Íslandi næsta summar. Men nú avsannar felagið tíðindini.

-Vit hava ongar ætlanir um at flúgva til Íslands næsta ár. Vit hava als ikki umhugsað møguleikan, sigur ein talsmaður hjá Ryanair við Morgunblaðið. Talsmaðurin leggur tó afturat, at felagið kannar alla tíðina, hvørjir møguleikar eru fyri øktari flúgving.

Írska felagið hevur kanska aðrar ætlanir. Í hvussu hevur hevur Ryanair bjóðað upp á eitt annað írskt flogfelag, Aer Lingus. Boðið sigst vera um 10 milliardir krónur. Stjórin í Ryanair, Michael O'Leary, sigur, at saman kunnu tey bæði feløgini taka kappingina upp við bretsk, fronsk og týsk flogfeløg.




# – Slíkt tekur tíð, Bjørk gjørdist heldur ikki kend frá degi til dag

**Skal føroysk mentan gera seg galdandi í Bretlandi, krevst sambært royndari umboðskvinnu hart arbeiði og stórt tol.**

FUNKY FAROE ISLANDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Íslenska Anna Hildur Hildibrandsdóttir hevur tikið sær av tónleikapartinum av At Fóta Sær í London. Hennara royndir og stóra netverk eru avgerandi fyri, at skráin fyri ráðstevnuna er vorðin somikið spennandi, og við hennara sambondum



*Anna Hildur hevur nógv sambond við røttu fólkini í London*

við fjølmiðlarnar og tónleikaídnaðin í Bretlandi, eru nógvar dyr gloppaðar.

Anna Hildur Hildibrandsdóttir hevur seinastu 3 árini arbeitt við sølufremjandi arbeiði í Bretlandi fyri háttvirda og stóra íslendska festivalin Iceland Airwaves, og seinasta árið hevur hon eisini tikið sær av Skandinaviska marknaðinum. Hetta arbeiðið gongur sera væl, og áhugin fyri festivalinum er stórur, sigur Anna Hildur.

Seinastu tíðina hevur hon so hjálpt til við fyriskipanini av hesi føroysku ráðstevuni, og hon leggur ikki skjól á, at hetta er arbeiði, ið henni hevur dámt.

- Eg var á fyrsta sinni í Føroyum í summar, har upplivdi eg m.a. G! Festivalin og kundi gleðast um stóra vøksturin í føroyskum tónleiki, greiðir Anna Hildur frá.

Hon heldur, at hetta tiltakið í London er eitt týdningarmikið stig og vísir, at Menningarstovan hevur fingið eyguni upp fyri, at ídnaður er annað enn bara fiskur. Hon heldur, at Kjartan Kristiansen og Annleyg Lamhauge áttu at fingið eitt herðaklapp fyri fyriskipanina av hesum tiltaki.

Bretski marknaðurin er somikið stórur, at gjøgnumbrot á honum hevði havt sera stóran týdning fyri listafólkið.

Samstundis minnir Anna Hildur á, at tú kundi ikki vænta at fáa gjøgnumbrot á bretska ella altjóða marknaðinum frá degi til dag. Íslendsku nøvnini, ið hava fingið gjøgnumbrot í Bretlandi: Bjørk og Sigur Rós hava arbeitt hart og leingi fyri hesum, t.d. brúktu Sigur Rós 8 ár við hesum arbeiðið, áðrenn teir gjørdust kendir í Bretlandi. Eisini Bjørk brúkti nógv ár, m.a. í Sugarcubes. Føroysk listafólk eiga at skilja, at hetta krevur stórt arbeiði.

- Tingini koyra munandi seinni í London. Tað sum tekur 5 minuttir í Føroyum og Íslandi tekur 1 ár í London. Alt er so stórt, at tú brúkar eina øgiliga tíð, segði Anna Hildur Hildibrandsdóttir.

# The Funky Ímynd - Føroyar og Branding

*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*

### Funky Faroe Islands, eitt forvitnisligt tiltak

Ein opin heimur í einari opnari verð har tøknin ger, at fjarstøðan ikki er størsta forðingin longur. Góðir ferðamøguleikar og alnótasamband til heimsins vitan viðførur, at Føroyar ikki neyðturviliga er ein útjaðari longur. Menningin flytur Føroyar landafrøðisliga frá fjarskotni í Atlantshavi, til at liggja mitt í Norðuratlantshavi. Men bert um vit sjálvi vilja tað.

### Ikki bert fiskur

Føroyar eru ein fiskivinnutjóð, men vil nógv annað, í hvussu so er um vit skulu taka føgru politisku orðingarnar til eftirtektar. Dentur verður lagdur á, at Føroyar skal verða eitt vitannarsamfelag, at vit skulu brúka tøknina, gerast partur av alheiminum og soleiðis eisini verða við til at fáa tey ungu og útbúnu heimaftur.

### Út

Føroyar eru í ávísan mun í einari tilgongd við at koma út í heim. Landið hevur handilsavtalur, fiskivinnusamstarv og roynir m.a. at knýta seg at EFTA. Men ein heimur við størri gjøgnumskygni og lættari atgongd til kunning og vitan, er eisini ein heimur sum flýtur yvir í vitan. Avbjóðingin í dag er at finna røttu vitanina, og tí eisini at senda tí røttu vitanina út. Tí er tað sera umráðandi, at arbeiða við at seta Føroyar á heimskortið.

Men tað er ikki nøktandi, at vit í hvør sínum lag gera hetta. Talan má verða um at hava eina miðvísa føroyska branding ætlan, har funnið verður fram til ein leist vit kunnu semjast um at varpa út í heim. Tað er alneyðugt at samskipa, tí vit hava fleiri áhugamál, t.d. at selja fisk, telduforrit, klæðir, ferðavinnu og frímerkir, sum hvør í sínum lagi gera eina ímynd. Tí er alneyðugt at arbeiða við at finna ein felags leist, men eisini at bróta burturúr nýggjum, sum t.d. Funky Faroe Islands, ið er í London í hesum døgum.

### Kreativt

Tað púra rætt eisini at leggja fokus yvir á kreativu vinnuna við klæðum, sniðgeving og tónleiki

Vit hava ikki ráð til at koyra milliardir í marknaðarføringarherferðir. Vit mugu arbeiða við tí vit hava og so brúka tað beinleiðis. Her kemur tøknin okkum aftur til góðar. KST gevur serliga nógvar møguleikar málrættað at breiða ein boðskap út, t.d. við stuttum filmum, sum málrættað verða spjaddir runt allan heimin umvegis teldupost, sum er ein av nýggju trendunum í marknaðarføring.

### Ímyndin - Funky

Líkamikið hvat vit vilja, so skulu vit semjast um hvørja ímynd vit ynskja at senda út í heim. Vit skulu hava eina branding strategi, sum gagnar, fiskivinnu, ferðavinnu, tónleiki, list, vitannarsamfelagnum o.s.fr..

Har eru tiltøk sum Funky Faroe Islands avgjørt ein spennandi leistur, tí við at brúka nakrar føroyskar einstaklingar, verður fokus sett á føroyskan kreativitet, ið tann vitjandi kann njóta við einum góðum bita frá Faroe Seafood, samstundis sum føroysku luttakararnir fáa ein fatan av hvat skal til fyri at koma fyri seg á enska, bretska og altjóða marknaðunum Tað ræður um at skapa eina ímynd við virðum. At gera føroyskar vørur til nakað serstakt við sál og søgu. Tí eru kreativ mentunnartiltøk sum hesi, ein partur av tí sum skal til, hóast tað ikki altíð hevur eitt beinleiðis søluvirði.

### Miðvíst

Ikki ber til enn at meta um tiltakið Funky Faroe Islands. Men skulu vit marknaðarføra Føroyar, so er givið, at hetta er ein av teimun heilt upplagdu møguleikunum, sum vit hava brúkt alt ov lítið. Vit hava eina ótrúliga sterka kreativa orku í okkara mentan, men higartil hava vit ikki duga at brúkt hana serliga væl til felags ágóða fyri Føroyar. Men, sum sagt í aðrastaðir í blaðnum, so er hetta ikki nakað sum kemur frá degi til dags. Tað krevur hart og miðvíst arbeiði og tekur langa tíð. Funky Faroe Islands er ein byrjan við meira miðvísum arbeiði við tí kreativa. Ein samansjóðing av at vísa hvat vit hava, men mest av øllum ein lærutúrur fyri føroyingar, sum vilja út í heim á hesum økjum. Vónandi er hetta ein leistur, sum vit fara at menna, tí at marknaðarføra Føroyar krevur at vit brúka alt sum vit hava av kreativiteti.